

# KT fólk til Skipasmiðjuna

Hevur tú hug at arbeiða í einum spennandi umhvørvi, við stórum fjølbroytni, í eini tí stórstu fyritøkuni í Føroyum?

Vit leita eftir einum KT-fólki sum hevur breiðan kunnleika til teldutøkni. Arbeiðið fevnir um alt vanligt viðlíkahald av teldum, netverkið og hjálp til okkara uml. 100 KT brúkarar, umframt at vera við til at leggja okkara framtíðarætlanir innan KT økið á deildum okkara í Tórshavn, á Skála, í Runavík og í Vestmanna.

Vit roknað við at tú ert røkin, álítandi, ikki bangin fyri at taka ímóti avbjóðingum og hevur lætt við at tosa við fólk.

Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvum, CV o.ø. skal sendast til:

Tórshavnar Skipasmiðju P/F
Postboks 65
FO-110 Tórshavn

Att: Tummas Nielsen

Umsóknarfreistin er 14. apríl 2008

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jens Hansen, KT- og trygdarleiðara á telefon 79 11 34 ella Tummas Nielsen, fíggjarleiðara á telefon 79 11 22

- ein depil innan skipatænastur

SKIPASMIÐJAN

---

SKÁLA SKÚLI

Skálavegur 194 - FO-480 Skála
Tlf. 441368 – Fax 441360
Skúlaleiðarin telefon 442118 far.tlf 586005
E-mail: skalask@post.olivant.fo
http://www.skulin.fo/ska/index.htm

## Fyri lærara í sjúkrafarloyvi

verður søkt eftir lærara frá **25. mars til 27. juni 2008.**

Viðkomandi kemur at undirvísa 24 tímar:
2. flokki støddfrøði (6 t)
6.-7. flokki donskum (4 t)
3.-4.-5. flokki handverk og list (4 t)
og 10 tímar við fjølbrekaðum næmingi.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann, ið settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Starvið verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera fyrstalæraranum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 31. mars.**

Meira kann fáast at vita um størvini frá fyrstalæraranum Hans Jákup Andreasen á tlf. 442118 ella 586005.

Eisini ber til at senda teldupost til skúlan.

### Skála skúli

*Skála skúli er ein 5. flokkaður skúli við undirvísing í 1.-7. árgang. Komandi skúlaár verða 9 lærarar og 70 næmingar.*

---

Grón SÍÐAN 1996

## Dagsins døgurði

### vika 14

**Mánadag**
Gullash – eplamorl afturvið

**Týsdag**
Kalkunsnitzel – championsós og epli afturvið

**Mikudag**
Milliónbúffur – eplamorl afturvið

**Hósdag**
Karry kylling – rís afturvið

**Fríggjadag**
Oksasteik – epli, sós, reyttkál afturvið

**Dagsins døgurði: kr. 47,50**

Við keyp av fleiri døgurðum, vinarliga bíleggið dagin fyri

**BAKARÍIÐ GRÓN**
**Hoyvíksvegur 65 · Tlf. 31 21 61**
**Postboks 1048 · 110 Tórshavn**

---

FØROYA LÆRARASKÚLI

## Reingerðisfólk til Føroya Læraraskúla

Lýst verður eftir reingerðisfólki til Føroya Læraraskúla, 4 tímar um dagin.

Arbeiðstíðin er allar skúladagar frá kl. 14.30 til 18.00.

Starvið verður sett skjótast tilber.
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Havnar Arbeiðskvinnufelag og Fíggjarmálaráðið.

Tey, ið vilja hava meira at vita, kunnu seta seg í samband við skúlatænaran, á telefon 213508.
Teldupostur kann sendast til flsk@flsk.fo

Tórshavn, 26. mars 2008

**Føroya Læraraskúli**
Postrúm 348
110 Tórshavn

---

P/f Oyspan
310 800 | 210 800

## Søkt verður eftir fólki við royndum innan húsabygging

**Talan er um fast starv við góðari løn til rætta persónin**

**Frættið nærri við at ringja á tel. 210800**

---

Diabetesfelag Føroya
www.diabetes.fo

## A ð a l f u n d u r

Aðalfundur felagsins verður í MBF-húsinum sunnudagin 30. mars 2008 klokkan 14.30

Skrá: smb. lógum felagsins

Eftir sjálvan aðalfundin heldur Hans Petur Nielsen, yvirlækni fyrilestur um hjartasjúkur og diabetes

**Nevndin**

---

Sosialurin -har tað hendir